Malta, Hirtshals

Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting. Sunnudagsskúlin byrjar aftur, tá skúlarnir byrja.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.

Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Samkoman Malta
í Hirtshals

Føroyahúsið í Keypmannahavn

Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 31 23 15 87
Fax 31 23 15 18
Kunningartlf. 31 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum.

Kaffistovan er opin frá kl. 14-19 hvønn dag uttan leygardag. Mánadag kl. 17–19 er Dagur og Vika o.a. Týsdag kl. 17.30 er døgurði. Føroysk bløð liggja frammi. Døgurðamatur, fløgur, bond, bøkur og ullvørur eru m.a. at fáa á kaffistovuni.

Ráðgevingin: Tlf. 31 23 99 80, Fax 31 23 92 34 er opin mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30–15.30. Mikudag kl. 14–18.

MFS, Tlf./fax 33250210 Opið mikudag og fríggjadag kl. 16–18.

Oyggjaskeggi, tlf./fax 31232310.

Nærvarp Okkara, tlf. 31228401.

Skúlin, 53681757.

VALUTAKURSIR

		02.10.97	Ultimo síðsta mán.
USA	**Dollarar**	674,7000	674,5000
Bretland	**Pund**	1089,3300	1088,9400
Týskland	**Markur**	381,0800	381,1300
Svøriki	**Króna**	89,0500	88,7300
Noreg	**Króna**	94,8900	94,9200
Frakland	**Frankur**	113,4800	113,5500
Belgia	**Frankur**	18,4810	18,4820
Sveits	**Frankur**	463,6100	463,2100
Holland	**Gyllin**	338,3000	338,3900
Italia	**Lira**	0,3887	0,3902
Finnland	**Markur**	127,4600	127,5000
Ísland	**Króna**	9,6500	9,6500
Eysturríki	**Skillingur**	54,1910	54,2010
Spania	**Pesetas**	4,5200	4,5210
Portugal	**Escudos**	3,7470	3,7490
Kanada	**Dollari**	490,2400	488,7500
Grikkaland	**Drakmur**	2,4390	2,4400
Japan	**Yen**	5,5628	5,5711
Írland	**Pund**	982,6600	982,9700
	XEU	747,0000	747,1800

Kelda: FØROYA SPARIKASSI

Silvurbrúdleyp

25. oktober kunnu hjúnini Marjun og Jóhan Heri Joensen, Fuglafjørður, halda silvurbrúdleyp.

Tey, sum vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, vinarliga ringið tlf. 44494 áðrenn 15. oktober.

Prógv

Katrina í Puntabyrgi, úr Trongisvági, tók 1. august 97 prógv sum revisorassistent hjá N. D. Revision, Registreret revision ApS., Hjørring.

HAVNAR BIO

7.000 fólk longu keypt atgongumerki til Barbu

Barbaru-filmurin fer at sláa øll met. Seinasta forsølumetið hjá Havnar Bio var bara 300 atgongumerki

At áhugin fór at vera stórur fyri filminum um Barbu í Føroyum, hevur ongantíð verið nakar ivi um.

Í kvøld verður filmurin frumframførður - og sleppur almenningurin fyri fyrstu ferð at síggja filmin, sum tó hevði tvær framførslur sunnudagin.

Filmurin hevur fingið sera góð ummæli, og verður roknað við, at nógv fólk fara at síggja filmin úti í heimi eisini.

Men í Føroyum hevur filmurin sett met í sølu av atgongumerkjum longu nú áðrenn filmurin er frumframførður.

Úr Havnar Bio søgdu teir í gjár, at tá vóru seldar fleiri enn 7.000 atgongumerki.

– Og tað er rættuliga nógv, sigur Jákup Eli Jacobsen. Tað mesta vit nakrantíð hava selt í forsølu hevur verið um 300 atgongumerki

– Tá var tað filmurin Løvernes Konge.

Annars plagar at bera til at bíleggja atgongumerki framman undan, men tað hava teir valt ikki at gera hesaferð, tí tað hevði verið alt ov mikið arbeiði av tí.

– Tað er sjálvandi ringt at bera saman við aðrar biografar, sigur Jákup Eli.

– Men til sammetingar kunnu vit taka filmin um Frk. Smillu - amerikanskt-framleiddi filmurin um grønlendsku gentuna, sum búði í Keypmannahavn.

– Tá hann varð frumframførður í Nuuk seldur teir 5.100 atgongumerki frammanundan. Men kortini sóu ikki fleiri enn 6.000 fólk filmin í Grønlandi.

– Hetta metið sláa vit so ríviliga, heldur hann.

Í Danmark er tað heldur ikki vanligt, at so nógv fólk leggja atgongumerki av framman undan.


– Tá Mr. Bean hevði frumframførslu í Keypmannahavn tosaðu teir um at so nógv atgongumerki vóru seld í forsølu - men talan var kortini ikki um fleiri enn 1.500!

– Skulu vit samanbera við tað, so hava vit næstan heimsmet, heldur Jákup Eli fyr.

Tað er eisini vert at merkja sær, at Barbara ikki bara verður vístur í Havnar Bio, men eisini í Klaksvík.

Nils Malmros hevur mett, at 20.000 føroyingar fara at síggja filmin. Onkur er eitt sindur varnari, og metir um 15.000 fólk - men eyðsæð er, at nógv fara at síggja filmin - og eins eyðsæð er tað, at fleiri føroyingar fara at síggja filmin fleiri ferðir.

Filmurin verður frumframførður í kvøld. Í blaðnum í morgin fara vit at greiða frá søgugongdini í filminum.



Fríggjadagur 03.10. kl. 19^{00} *)
Leygardagur 04.10. kl. 16^{00} *)
Leygardagur 04.10. kl. 22^{00} *)
Sunnudagur 05.10. kl. 19^{00} *)
Mánadagur 06.10. kl. 19^{00} *)
Týsdagur 07.10. kl. 19^{00} *)
Mikudagur 08.10. kl. 19^{00} *)
Hósdagur 09.10. kl. 19^{00} *)
Fríggjadagur 10.10. kl. 17^{00}**)
Leygardagur 11.10. kl. 16^{00} *)
Sunnudagur 12.10. kl. 17^{00} *)
Mánadagur 13.10. kl. 16^{30}
Týsdagur 14.10. kl. 16^{30}
Mikudagur 15.10. kl. 16^{30}
Hósdagur 16.10. kl. 16^{30}

Fríggjadagur 03.10. kl. 22^{00} *)
Leygardagur 04.10. kl. 19^{00} *)
Sunnudagur 05.10. kl. 16^{00} *)
Sunnudagur 05.10. kl. 22^{00} *)
Mánadagur 06.10. kl. 22^{00}**)
Týsdagur 07.10. kl. 22^{00}
Mikudagur 08.10. kl. 22^{00}
Hósdagur 09.10. kl. 22^{00}
Fríggjadagur 10.10. kl. 20^{00} *)
Leygardagur 11.10. kl. 19^{00} *)
Sunnudagur 12.10. kl. 20^{00}**)
Mánadagur 13.10. kl. 19^{30}
Týsdagur 14.10. kl. 19^{30}
Mikudagur 15.10. kl. 19^{30}
Hósdagur 16.10. kl. 19^{30}

*) útselt
**) Fá pláss eftir
Skúlasýningar og eykasýningar verða fyriskipaðar

HAVNAR BIO
★ Tlf. 11956 ★



Fríggjadagur 03.10. kl. 17^{45}
Leygardagur 04.10. kl. 17^{45}
Sunnudagur 05.10. kl. 17^{00}

Fríggjadagur 03.10. kl. 23^{00}
Leygardagur 04.10. kl. 23^{00}
Sunnudagur 05.10. kl. 22^{30}



Fríggjadagur 03.10. kl. 20^{00}
Sunnudagur 05.10. kl. 19^{30}
Leygardagur 04.10. kl. 20^{00}



Frumsýning fríggjadagin 10.10. kl. 23^{00}